Almanna- og mentamálaráðið

Dagfesting: 11. desember 2025
Mál nr.: 25/28720-6
Málsviðgjørt: HP

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	Løgtingslógaruppskotið
	§ 1 Í løgtingslóg nr. 48 frá 10. mai 1999 um almannapensjónir o.a., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 117 frá 9. desember 2024, verða gjørdar hesar broytingar:
§ 4. Fólkapensjónsaldurin er: 1) 67 ár fyri persón, ið er føddur áðrenn 1. juli 1957. 2) 67 ½ ár fyri persón, ið er føddur í tíðarskeiðinum 1. juli 1957 til 31. desember 1962. 3) 68 ár fyri persón, ið er føddur eftir 31. desember 1962. *Stk. 2.* Í 2025 og 5. hvørt ár eftir hetta verður gjørd útrokning sbrt. stk. 3, um fólkapensjónsaldurin skal tillagast fyri persón, ið er føddur eftir 31. desember 1962. *Stk. 3.* Fólkapensjónsaldurin fyri persón, ið er føddur eftir 31. desember 1962 verður hækkaður, um so er, at miðallívstíðin sambært eini meting frá Hagstovuni fyri tey	**1.** § 4 verður strikað, og í staðin verður sett: "**§ 4.** Fólkapensjónsaldurin er: 1) 67 ár fyri persón, ið er føddur áðrenn 1. juli 1957. 2) 67 ár og 6 mánaðir fyri persón, ið er føddur í tíðarskeiðinum 1. juli 1957 til 31. desember 1962. 3) 68 ár fyri persón, ið er føddur í tíðarskeiðinum 1. januar 1963 til 31. desember 1966. 4) 68 ár og 6 mánaðir fyri persón, ið er føddur í tíðarskeiðinum 1. januar 1967 til 30. juni 1969. 5) 69 ár fyri persón, ið er føddur aftan á 30. juni 1969.

65-ára gomlu seinastu 2 árini fer upp um lívstíðina í 2013-2014, ið var 85,5 ár. Lívstíðin verður gjørd upp sum eitt einfalt miðaltal fyri menn og kvinnur. Um lívstíðin er hægri enn 85,5 seinastu 2 árini, ásetur landsstýrisfólkið fólkapensjónsaldurin samsvarandi lívstíðini fyri tey 65-ára gomlu seinasta árið lagt afturat ein treytaður vøkstur í lívstíðini á 0,2 ár og frádrigið eitt fólkapensjónstíðarskeið á 18 ár. Avrundað verður niður til næsta hálva ár. *Stk. 4*. Fólkapensjónsaldurin verður tillagaður við í mesta lagi ½ ári í senn. Fólkapensjónsaldurin verður ásettur í løgtingslóg við virknaði frá 1. januar í álmanakkaárinum 10 ár aftaná árið, tá fólkapensjónsaldurin varð tillagaður sambært stk. 2.	*Stk. 2.* Í seinasta lagi 1. januar 2031 verður pensjónsaldur ásettur, galdandi frá 1. januar 2041. *Stk. 3.* Í seinasta lagi 1. januar 2034 verður pensjónsaldur ásettur, galdandi frá 1. januar 2044. *Stk. 4.* Pensjónsaldurin sambært stk. 2 og 3 verður ásettur við støði í mettari gongd í livialdrinum frameftir og haldførisútlitunum í føroyska búskapinum.”
§ 5 a. Framskundað pensjón kann tillutast persóni, sum lýkur treytirnar fyri tillutan av fyritíðarpensjón sbrt. § 8. *Stk. 2*. Søkjast kann Almannaverkið um framskundaða pensjón frá 3 árum áðrenn galdandi pensjónsaldur sbrt. § 4. *Stk. 3*….	**2.** § 5 a, stk. 2 verður orðað soleiðis: “*Stk. 2.* Framskundað pensjón kann tillutast persóni, ið er eldri enn 64 ár og 6 mánaðir. Frá 1. juli 2030 kann framskundað pensjón tillutast persóni, ið er fyltur 65 ár.”
	§ 2 Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.